Eitt av endamálum samkomunnar er læra (Matt. 28:19-20). Tí vilja vit bjóða nógvar og fjølbroyttar møguleikar at læra um Harran Jesus Kristus í samkomuni.

Jógvan Z skipar fyri tiltakinum, og flestu lærararnir verða úr Lívdini.

Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, bøn og læru og bjóða øðrum - bæði ungum og gomlum - við.

Eisini verða skeið og ráðstevnur ein regluligur partur av læruni í Lívdini. Hetta verður lýst hvørja ferð.

## samkoman lívdin


oman hoydalar 28
(við vegin langa)
fo – 188 hoyvík




Týskvøld frá kl. 18:50 til kl. 20:20

- undirvísing
- hugsa & samtala
- endi & samfelag

Lívdin ynskir – á viðkomandi, frælsan og ábyrgdarfullan hátt – at gera lærisveinar, sum dýrmeta Gud við at liva Guds endamál, breiða út frelsuætlan Hansara, hjálpa og vísa umsorgan.

lívdin
- í lívd hins hægsta

www.livdin.fo



# undirvísing & samtala týskvøld í lívdini

september - desember 2011

# evnir og tíðir

Eitt sera týdningarmikið evni verður viðgjørd seinnu hálvu í 2011. Tað er "Lív & Læra Jesusar." Fyri ikki at binda fólk øll týskvøld verður ikki undirvíst ta kvøldið kyknubólkar eru. Evnini eru sjálvstøðug, men tó samanhangandi. Evnini geva eina góða heildarmynd og innlit í lív og læru Jesusar og hvønn týdning tað hevur fyri okkum í dag. Bøn okkara er, at hetta verður til uppbygging, sannføring og troyst.

# týskvøld

Undirvísing 18:50-20:20 → Steðgur 20:20-20:30 → Bønarløta 20:30-22:00






**september**

6. Finna vit Jesus í Gamla Testamenti?
13. Hvussu er Jesus Gud & menniskja?
20. Kyknubólkar
27. Samtíð og umstøður Jesusar

**oktober**

4. Hvat gjørdi læru Jesusar so radikala?
11. Kyknubólkar
18. Standa vit undrandi um undur Jesusar?
25. Skulu vit altíð vera sum Jesus?

**november**

1. Kyknubólkar
8. Missiónsboðini eru meiri enn missiónsboð
15. Er Jesus til verka í dag?
22. Kyknubólkar
29. Er pláss fyri Jesusi í framtíðini?

**desember**

6. Høvi at spyrja spurningar um lív og læru Jesusar
13. Kyknubólkar
20. Jólafrí
27. Jólafrí